TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Lærari til hárfríðkanardeildina

Starvið, sum umfatar undirvísing á hárfríðkanardeildini, er eitt **avloysarastarv** fyri lærara í farloyvi í uml. 1 ár.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum hárfríðkari og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Neyðugt er at umsøkjarin er væl dagførdur í hárfríðkanaryrkinum, er ágrýtin og hevur hegni at fáast við ungfólk. Umsøkjari, sum hevur útbúgving ella royndir innan kosmetikk og húðrøkt hevur fyrimun.

*Á hárfríðkanardeildini starvast 2 lærarar í føstum starvi. Næmingarnir læra til hárfríðkara og ganga í skúla í 60 vikur tilsamans. Eisini verða SIT-næmingar undirvístir á deildini.*

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast 11. august 2003.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 9. juli 2003.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
e-mail: tst@tst.fo

# LUTASEÐIL

Fæst á Statoilstøðunum kring landið



1. Toyota Corolla 1.6 Terra Sedan (Frá Rogni Service) — virði 199.600 kr.
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bil Tórshavn-Hanstholm t/r við uppihaldi í eina viku í Danland ella DanCenter (Frá Smyril Line) — virði 19.995 kr.
3. Olja frá Statoil — virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Thomas Dam á Hálsi — virði 10.000 kr.
5. Apex ferðaseðil fyri 2 til DK t/r (Frá Smyril Line) — virði 6.266 kr.
6. Gávukort frá LM handlinum — virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Radiohandlinum v/ E. & P. Persson — virði 5.000 kr.
9. Føroyskt krov — virði 1.000 kr.

STATOIL

**Tórshavnar Ítróttarráð**
**2003** 20 kr.

## Teknmálstulkatænastan
# Teknmálstulkar

Søkt verður eftir útbúnum teknmálstulki at byrja 15. aug. 2003 ella skjótast til ber. Starvið er 20 tímar um vikuna.

Vegna barnsburðarfarloyvið verður søkt eftir útbúnum teknmálstulki fyri tíðarskeiðið 15. aug. til 31. des. 2003. Starvið er fulla tíð.

Størvini eru dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði og verða lønt eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri.

Umsóknarfreistin er 14.07.2003.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Margrethu Clementsen tlf. 319012 ella 219006.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum skulu sendast til:

**Teknmálstulkatænastan**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn

# Nólsoyar skúli

Søkt verður eftir lærara at undirvísa uml. 15 tímar um vikuna vegna avloypstímar.

Í Nólsoyar skúla eru 34 næmingar frá 1. til 9. flokk, so undirvísingin er samskipað við fleiri flokkum í sama bólki.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004 og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkum 18.1–27.4.

Freist at lata inn skrivliga umsókn er 30. juni.

Meir fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 327033 / 327119 ella til skúlastýrið.

**Nólsoyar skúlastýri**
v/ Annu Marnu Holm
FO-270 Nólsoy
Tlf. 327017

# Várkappríðing í Vágum

Várkappríðingin hjá Vága Ríðingafelag verður Niðri við Vatn tann 28. juni. Kappast verður í trav, tvíspori og tølt. Tilmelding í seinasta lagi hósdagin 26. juni kl. 19.00 á

**Tlf. 333710 ella 332025**
**Vága ríðingafelag**

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Sosialurin - 311820

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering



**Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið**

**Danstein** Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

# Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og alminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard

Student í Hoydølum '93?



Melda teg til jubilæumsveitsluna NÚ!

| | |
|---|---|
| Hanus | (45) 22 64 23 44 |
| Marjun | (45) 22 34 36 98 |
| Janus | (45) 60 92 02 04 |
| Guri | (45) 22 89 56 89 |

Les meira:
http://reinert.starthotel.dk/veitsla

Sosialurin 341800

# Rør & Blikk

## RØR & BLIKKSMIÐUR

Søkt verður eftir rørsmiði, blikksmiði ella fólki við royndum innan HVS arbeiði, at byrja beinanvegin.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn,
tel 322 999 fartel 225 345
www.rorblikk.fo



P/F Tórshavnar Skipasmiðja søkir eftir fólki til

## AMBOÐSGOYMSLUNA

Tann, ið settur verður, fær høvuðsábyrgd av amboðsgoymsluni.
Hetta fevnir í høvuðsheitum um:

- At halda gott skil á amboðunum og á amboðsgoymsluni sum heild
- Keyp og viðlíkahald av amboðum

Tað er ein fyrimunur, at tann setti hevur útbúgving innan maskinfakið.
Eisini verður stórur dentur lagdur á at viðkomandi er røkin og nærlagdur.

Starvið ynskist sett skjótast gjørligt og áhugaði kunnu venda sær til Mouritz Mohr. tlf. 31 11 55 ella 21 85 36.

**TÓRSHAVNAR SKIPASMIÐJA**
www.faroeyard.fo

*Tórshavnar Skipasmiðja er móðirfelag hjá samtakinum ið umfatar skipasmiðjurnar í Havn, á Skála, í Vestmanna og mekaniskan verkstað í Runavík.*
*Á skipasmiðjuni í Havn arbeiða um 170 fólk*



Sosialurin 341800

STARV sosialurin

# Blaðfólk til Eysturoyarredaktiónina

Til at røkja spennandi, avbjóðandi og fjølbroyttar arbeiðsuppgávur verður søkt eftir blaðfólki til Sosialin.

Talan er fyrst og fremst um at røkja uppgávur á Eysturoyarredaktión okkara í Saltangará og kring alla oynna. Men tað verða eisini uppgávur á hinum redaktiónunum hjá blaðnum kring landið her serstakliga høvuðsredaktiónini á Argjum umframt á rullandi redaktiónini.

Vit hugsa okkum, at tú skal byrja eftir summarfrítíðina, helst frá 1. í august. Møguleiki verður tó eisini at byrja fyrr.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. Ert tú uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist, og at tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, sum kann gerast fitt, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341800. Ella at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 23. juni. Umsóknir við viðkomandi skjølum verða at senda til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**100 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

Sosialurin 341800

# summarstevnan 2003
## hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum

Verið vælkomin á summarstevnu, sum í ár verður hildin á Tekniska Skúla í Klaksvík.

**Hósdag 03.07.**
kl. 20.00 Møti: Egil Sjaastad og Justinus Poulsen
Martha og Tummas Pauli Mýri syngja

**Fríggjadag 04.07.**
kl. 10.00 Bønamøti
kl. 10.30 Bíbliutími: Hanus Simonsen
kl. 16.00 Missiónsmøti: Absalon Matras, Elsa Jacobsen og Árant Johannesen
Føroyskir næmingar á LMH syngja
kl. 19.30 Møti: Egil Sjaastad og Egil Joensen
Trio av Skálafjørðinum syngur

**Leygardag 05.07.**
kl. 10.00 Bønamøti
kl. 10.30 Bíbliutími Egil Sjaastad
kl. 16.00 Møti: Øssur Kjølbro og Marna Ellingsgaard
Essa Jacobsen syngur
kl. 19.30 Møti: Egil Sjaastad og Jóhan Henriksen
Manskór úr KFUM & K, Klaksvík syngur
kl. 22.00 Ungdómsmøti
Systkini Askham luttaka við sangi

**Sunnudag 06.07.**
kl. 11.00 Gudstænasta við altargongd í Christianskirkjuni
kl. 15.00 Familjumøti: Árant Johannesen og Elsa Jacobsen
kl. 18.00 Møti í Christianskirkjuni: Egil Sjaastad og Árant Johannesen.
Streingjakór úr KFUM & K, Klaksvík syngur

Vit hava nøkur kømur á skúlanum til tey, sum ikki vita sær innivist. Tilmelding á tlf. nr. 455078 og 457406 Kostnaður: 100 kr. fyri song í eina nátt.

Morgunmatur, døgurði og nátturði fæst á skúlanum.

Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við til møtir og bíbliutímar.

**Kirkjuliga Missiónsfelagið**

# Hoyggjturkari



**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

- Turkar 20' kontainara við vátum grasi uppá uml. 6-8 tímar
- Bilígur í rakstri uml. kr. 20,- um tíman íroknað streym og dieselolju
- Tú kanst turka gras í oysandi regni fyri umleið kr. 20,- um tíman
- Kvalitetur og long lívitíð
- Royndir í Føroyum við sera góðum úrsliti

**Seinasta freist at bíleggja fyri at náa levering til slátturin í ár er innan 01.06.03**

Sosialurin 341800